SJÚKRAHÚS VERKIÐ

# Landssjúkrahúsið - Oyrna-Nasa-Hálsdeildin - B4

## Vegleiðing til beinan av nasaskilavegginum

### Á skurðviðgerðardegnum:

Fasta frá midnátt
Fá tær bað og vaska hár.
Nýt ikki smyrsl/neglalakk.
Lat virðismiklar lutir liggja eftir heima (Smykkir v.m.)
Tú kanst hava ein avvarandi við tær, til tú verður koyrd/ur á skurðstovuna.
Tilmælt verður at taka 1 g Panodil e.l. við eitt sindur av vatni beint áðrenn komu á Landssjúkrahúsið.

### Aftaná skurðviðgerðina:

Ansað verður eftir tær á G1 nakrar tímar eftir skurðviðgerð.
Vanligt er at liggja á sjúkrahúsinum til dagin eftir.

### Frameftir:

Tað kann seyra blóð úr aftaná skurðviðgerðina, og hetta er normalt.
Ílagdar verða plastikkplátur í nøsina við kanalum at anda partvíst ígjøgnum. Tó onkuntíð verða ílagdar tamponir í nøsina, so ikki ber til at anda ígjøgnum nøsina. Hesar verða tiknar eftir 1 døgn.
Sov tí við høvdinum høgt.
Um trupulleikar eru av skorpum í nøsini, eftir at plastikkpláturnar eru tiknar, verður tilmælt saltvatnssnúsan. Endiliga ikki pilka í. Tú mást gjarna skola við saltvatni meðan pláturnar eru í nøsini.
Pláturnar verða tiknar 1 viku eftir skurðviðgerðina ambulant á B4.

### Pína:

Tú kanst hava pínu í nøsini, og tá ber til at taka 2 tab. Panodil, í mesta lagi x 4 dagliga, møguliga saman við Ibuprofen 400 mg, í mesta lagi x 3 dagliga.
Um tú fært fepur ella pínan versnar, mást tú siga okkum frá.

### Hvíld / Læknaváttan

Læknaváttan verður skrivað í samráð við lækna efter skurðviðgerðina.

Tú skalt binda fri, og ikki íðka ítrótt ella gera hart likamligt arbeiði 3 vikur aftaná skurðviðgerðina.

Okt. 2025

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo